

*Í Froðba hava Annika og Dennis eini hús í gerð. Allastaðni upplivir tú eitt hugtakandi spæl við ljósi, sum kemur inn í rúmið úr ymiskum vinklum. Og útsýnið er fantastiskt.*

koyrur í lægri geari her suðuri, tí eg virði tað at hava stundir at tosa og tvætla við kundarnar. Eg flenni nógv, men taki eisini tað álvarsliga. Havi stundir at fylgja við og kenna eftir, at alt nú er í lagi. Og eg havi stundir til míni medmenniskju, til mín sjálvan, stundir til at ganga í fjøllunum, og ikki bara hyggja at teimum ella kanska slett ikki síggja tey.

- Katla er nú 10 ár, og hon hevur gingið í øllum fjøllunum kring býin. Og við Hugin, sum er 6 ár, kanst tú koyra og ganga til ævintýrakend støð, og bara vera 5 minuttir frá húsum. Tí er so deiligt at vera her, sigur Annika.

## Skúlin skal vera góður

- Men vit skulu ansað væl eftir okkara lítla samfelag. Í Grønlandi sá eg, hvussu skjótt alt endar í einum ruðuleika, um eitt nú skúlin ikki virkar. Í Aasiaat var studentarskúli, men tað var striltið at fáa tey ungu at fullføra skúlagongdina og motivera tey til víðari lesnað. Tey, sum fóru av landinum til víðari lesnað, longdust illa heim, og fleiri komu heimaftur. Foreldrini vóru sjáldan til nakra hjálp, tí tey longdust eisini, og grótu í telefonini eftir børnunum.

- Vit tosa nógv um okkara skúla, og um vit eru á veg hagar, at skúlaverkið ikki virkar nóg væl, so speglar tað seg beinanvegin aftur í restini av samfelagnum. Tí er tað so umráðandi, at vit hava góð ansingarpláss og góðir pedagogar, sum kunnu stimulera børnini til at fara í skúla, ein góðan skúla, har lærarnir eru up to date, heldur Annika Næs Johannesen.

- Tað merkir eisini, at endurútbúgving, bæði av lærarum og pedagogum, má vera eitt krav. Um børnini sleppa at vera her sum longst, fáa tey nógvar dygdir, at liva víðari uppá, og standa seg væl, tá tey fara hagani. Men tað merkir so eisini, at tíðin her skal vera ein góð útbúgving, bæði tá tey eru í skúla og hava frí. Tað skapar sjálvsvirðing.

- Eg eri glað fyri, at vit hava ein fínan musikkskúla, og í næstu framtíð hava vit eisini eitt ungdómshús. Børnini kunnu íðkað ítrótt, men eg harmist um, at eitt so gott tiltak sum Spírarnar ikki er fyri alla oynna, men bert í Vági. Og so hava vit onki nútímans bókasavn, tað sakni eg nógv, og haldi tað vera undir alt lágmark. Eisini kundu vit gjørt býin meiri barnavinarligan. Vit